## Tunt í verjuni hjá Arsenal

Í kvøld kl. 19.45 tekur Arsenal ímóti spanska liðnum Villareal á Emirates Leikvøllinum í London. Talan er um seinnu fjórðingsfinaluna í Champions League kappingini. Fyrri dysturin í Spania endaði við javnleiki 1-1. Tunt er í verjuni hjá Arsenal, tí Londonliðið má síggja burtur frá Johan Djourou og Gael Clichy, sum báðir eru skaddir í ávikavist knænum og rygginum. Haraftrat er William Gallas eisini skaddur í knænum. Villareal má síggja burtur frá miðvallaranum, Marcos Senna, sum fekk ein skaða farna vikuskiftið.






## Fjórðingsfinalurnar um Løgmanssteypið

Nú er greitt, hvussu tey átta liðini, sum eru eftir í steypakappingini, møtast í fjórðingsfinalunum í kappingini um Løgmanssteypið um tvær vikur. Lutakast var í gjárkvøldið, og er talan um hesar dystir. EB/Streymur-FC Hoyvík, TB-AB, 07 Vestur-ÍF, Víkingur-HB. Vinnararnir koma í hálvfinalurnar, sum verða spældar 13. og 28. mai. Sjálv finalan um Løgmanssteypið verður á ólavsøku, 29. juli.

# Gudmundur vann Páskiatriathlon

**Gudmundur Joensen varð greiður vinnari, tá páskiatriathlon var á skránni um høgtíðina**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Føroya Triathlon Felag skipaði í 2 páskadag fyri Sprint triathlon, sum er 750 m svimjing, 20 km súkkling, 5,75 km renning.

Ikki óvantað var Gudmundur Joensen skjótastur á øllum teinunum. Hann og Susanna Skylv Sørensen royndu seg í nýggju vátdraktunum, og vísti tað seg at vera ein stórur fyrimunur, tey svumu væl skjótari enn í vanligum svimjiklæðum. Draktirnar eru gjørdar at verja móti kulda, so í svimjihyli eru tær heldur heitar, men á 750 m gongur tað. Og sjálvt um draktirnar eru ringar at sleppa úr, so gingi skiftini hjá báðum væl og skjótt.

Gudmundur hevur tikið seg væl fram í súkkling, og súkklaði hann eisini framúr væl, at eingin fylgdi honum. Hann kundi tí púra einsamallur renna um málstrikuna, við føroya bestu tíð á hesum sprint teininum. Súsanna Skylv Sørensen svam eisini væl, og var nr 2 úr hylinum. Gunnar Dahl Olsen, sum var triðjur úr hylinum, fekk Súsonnu aftur á súkkluteininum, men hon svaraði aftur á renniteininum og vann seg fram um aftur, og kom á mál sum nr. 2 og gunnar sum nr 3.

Andrass Joensen svam sína bestu tíð, men hevði ein ringan dag á súkkluni. Hann var so óheppin, at bakhjólið skeyt seg, so tað tók í, og av ótta fyri teimum, ið komu aftan á honum, helt hann fram uttan at rætta brekið. Honum eydnaðist at koma á mál áðrenn Evald Rasmussen og Kári Simonsen, og sloppin á renniteinin, kom aftur ferð á , og bleiv hann næstbestur á renniteininum.

Veteranarnir báðir Evald Rasmussen og Kári Simonsen, kappaðust sum vanligt aftur hesaferð. Í svimjingini stóð á jøvnum, men á súkkluna vann Evald so mikið fram um Kára, at hann, sjálvt um hann rann skjótari, ikki vann missin inn aftur. Kári hevur ikki súkklað so nógv í vár. Hann hevur hinvegin runnið nógv, tí ætlanin er at renna keypmannnahavn Marathon, og verður tað fyrstu ferð at Kári fer at renna so langt.



*Gudmundur Joensen úr Havn var fyrstur um málstrikuna, tá páskatriathlon varð hildið*

**Páskatriathlon**

| Menn | Svimjing | skift | Súkkling | skift | Renning |
|---|---|---|---|---|---|
| Gudmundur Joensen | 9.02 | 1.46 | 31.45 | 0.23 | 19.22 |
| Gunnar D. Olsen | 11.36 | 2.07 | 32.49 | 0.21 | 25.53 |
| Andrass Joensen | 12.28 | 1.35 | 39.47 | 0.20 | 22.56 |
| | | | | | |
| Kvinnur | | | | | |
| Súsanna S. Sørensen | 9.56 | 1.55 | 36.19 | 0.07 | 23.03 |
| | | | | | |
| Veteranar | | | | | |
| Evald Rasmussen | 13.49 | 1.57 | 40.11 | 0.23 | 27.59 |
| Kári Simonsen | 14.11 | 2.51 | 43.31 | 0.35 | 27.22 |



*Saman við fleiri øðrum tykist Bjartur Lamhauge at vera eitt gott boð upp á nýggjan føroyameistara í badminton*

# FM-dysturin er víðopin

Leygardagin verur stóri finaludagurin í badmintonhøllini í Havn. Seinnu árini er ein fantastisk siðvenja komin í lag, har einstaklingaítróttargreinar nar badminton, judo og borðtennis rættiliga hava fingið vind í seglini í eini felags roynd, at fáa meira fokus á hesar ítróttargreinarnar. Sjónvarpið vísir finaludagin beinleiðis.

Men áðrenn finalistarnir eru funnir í Badminton, eru nógvir fjøðrabóltar slitnir upp uppi í badmintonhøllini hóskvøldi og fríggjakvøldi. Tá eru innleiðandi kappingarnar í Badminton, og tað hevur sjáldan verið so spennandi sum í ár.

Stórur spenningur er um, hvør kemur í finaluna í einmansleiki hjá monnum. Partvís tí at tað eru rættiliga nógvir spælarar sum kunnu spæla seg í finaluna í ár, og sjálvandi eisini tí, at finalan verður víst beinleiðis í sjónvarpinum.

Fremsti spælarin seinnu árini hevur verið Niklas Eysturoy, men hann verður ikki við, nú hann er skaddur.

Tað letur upp fyri øðrum møguleikum, og ein teirra er Aksel Poulsen, sum hóast fýra finaluplás enn ikki hevur vunnið FM.

Eisini eru Bjartur Lamhauge, Ragnar Jacobsen, Rógvi Poulsen, Magnus Gaard og Absalon Eysturoy góð boð upp á nýggjan føroyameistara, so alt í alt bendir tað mesta á eitt sera spennandi finaluumfar.